Alt Landssjúkrahúsumráðið
er roykfrítt



Í Gestalonini má ein vera heilt sjálvhjálpin - eingi røktarstarvsfólk eru, sí annars reglugerð fyri húsarhald á kunningarskjalinum ella á okkara heimasíðu. Ein lokaltelefon er á gongini, har ringjast kann til Leiðbeining, lokal 9, sum kann umstilla teg víðari.



Vinarliga far væl um og rudda upp eftir tær.

Kostnaður fyri yvirnátting, sum skal gjaldast í Leiðbeining:

Sjúklingar, sum ikki eru innlagdir: ókeypis

Yvirnátting einkult kamar: kr. 200,- /100,- eftirfylg. 5. dag

Yvirnátting dupult kamar:  kr. 300,- /200,- eftirfylg. 5. dag

Vit ynskja tær eitt gott uppihald í Gestalonini

Landssjúkrahúsið

www.ls.fo

# Gisting í Gestalonini






Landssjúkrahúsið

www.ls.fo

## Gestalonin

Á Eirargarði eru fýra stórir bygningar á seks hæddir hvør. Gestalonin er í bygningi nr. 4. Møguleiki er fyri at gista hjá sjúklingum, sum ikki eru innløgd og/ella avvarðandi.



Kemur tú til viðgerðar og hevur langan veg, ber til at nýta Gestalonina. Avvarðandi, ið hevur fyri neyðuni at verða um náttina, kunnu fáa kamar í Gestalonini.



Køkur/uppihaldsstova og baðirúm eru felags. Kømurni eru uppdeild í einkult- ella dupultkømur við sjónvarp. Eisini er tráðleyst internet.



Tað er avvarðandi deild, sum bíleggur kamar. Lykilin, saman við kunning, fæst hjá Leiðbeining í Forhøllini, tá opið er (07.00-21.00). Goldið verður fyri lykilin - kr. 300,- sum verður endurrindað við fráferð.

## Matur

Í Køkinum (Eirargarður 7) ber til at keypa mat. Eisini ber til at keypa ymiskt leskiligt í hugnaligum umhvørvi í kaféini í Forhølllini.



Í samráð við avvarðandi deild er eisini møguleiki hjá sjúklingum at fáa matkort.

**Upp– og afturlatingartíðir í kaféini:**

Mána- fríggjadag: 08.00 – 20.00
Leygardag: 10.00 – 20.00
Sunnudag: 14.30 – 20.00

